# Snotiligir karmar hjá Fisk



Næmingar í fyrsta flokki á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna. Eins og lærarar gleða tey seg til komandi mánadag og skúlagongd í nýggjum hølum

**Í dag verður nýggi Fiskivinnuskúlin alment handaður leiðslu skúlans á samkomu klokkan 15. Mánadagin komandi kann undirvísingin so byrja í nýggju hølunum niðri við sjóvarmálan**

FISKIVINNUSKÚLI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Tað má sigast at vera ógvuliga óskandi, at Fiskivinnuskúlin í Vestmanna kann flyta í nýggj hølir snøggliga 20 ár eftir, at hesin skúlin á fyrsta sinni sá dagsins ljós.

Fiskivinnuskúlin byrjaði undirvísing í 1989 í einum sethúsum, sum vórðu keypt til endamálið, og hevur síðani verið útbygdur við nýggjum hølum í leigaðum húsum, so skúlin í dag húsast í fýra ymiskum bygningum.

Men hetta verður alt broytt, tí komandi mánadag byrjar undirvísingin í nýggju hølunum niðri við sjóvarmálan – eitt passandi stað at leggja ein fiskivinnuskúla.

Hetta verður ein kollvelting av teimum stóru fyri bæði næmingar og lærarar. Ikki minst slepst nú undan at renna millum hús í sjaskveðri um vetrarnar, og bara tað í sjálvum sær er ein stór betring.

Nýggju hølini eru sum nevnt sera snøgg, og rannsóknarstovan, flakalinjan og ikki minst auditoriumið eru state of the art.

- Nú hølisviðurskiftini verða so munandi betrað, fer at bera til hjá okkum at taka fleiri næmingar inn. Vit hava higartil hildið okkum til 20 næmingar fyrsta árið, men nú vit flyta inn í nýggj hølir, kunnu vit taka minst 24 á hvørjum ári, sigur jákup Andreasen, skúlastjóri.



Jákup Andreasen, skúlastjóri, og Magni Laksáfoss. Tingmaðurin undirvísir í alibúskapi á Fiskivinnuskúlanum

## Gott pláss

Nýggi Fiskivinnuskúlin hevur tríggjar floksstovur, sum hvør hevur eitt bólkarúm. Hetta nøktar tørvin, tí tað eru bert tríggir árgangir á skúlanum í senn.

- Talan er um eina tríára gymnasiala miðnámsútbúgving. Á skúlanum eru tvær breytir, ein alibreyt og ein matbreyt, sigur Jákup Andreasen.

Inni í skúlanum er eisini eitt stórt felagshøli, sum verður nýtt til kantinu. Og